## Eg var boðin í brúdleyp

1.

Eg var boðin í brúdleyp
tann vívilkrans
eg átti mær eingi klæði
til jomfrúdans
tá var friðurin heima.

2.

Eg fór til mína systur
tann vívilkrans
bað hana læna mær klæði
til jomfrúdans
tá var friðurin heima.

3.

Systir svaraði mær illa
tann vívilkrans
bað meg veva og spinna
til jomfrúdans
tá var friðurin heima.

4.

Eg fór til mína móður
tann vívilkrans
bað hana læna mær klæði
til jomfrúdans
tá var friðurin heima.

5.

Móðir svaraði mær illa
tann vívilkrans
bað meg veva og spinna
til jomfrúdans
tá var friðurin heima.

6.

Eg fór til mína ommu
tann vívilkrans
bað hana læna mær klæði
til jomfrúdans
tá var friðurin heima.

7.

Omma svaraði mær illa
tann vívilkrans
bað meg veva og spinna
til jomfrúdans
tá var friðurin heima.

8.

Eg setti meg aleina
tann vívilkrans
eg spann mær fimtan teinar
til jomfrúdans
tá var friðurin heima.

9.

Eg spann hár, eg spann strá,
tann vívilkrans
hvørt eitt busk, á gólvi lá
til jomfrúdans
tá var friðurin heima.

10.

Eg setti mín vev út í eina vrá
tann vívilkrans
har kom einki skilið á
til jomfrúdans
tá var friðurin heima.

11.

Eg setti mín vev út í eitt skot
tann vívilkrans
har var einki uttan klíggjabrot
til jomfrúdans
tá var friðurin heima.

12.

Mín vevur fór upp á jóladag
tann vívilkrans
hann kom ikki niður fyrr enn páskadag
til jomfrúdans
tá var friðurin heima.

13.

Mín vevur stóð so leingi
tann vívilkrans
meg spottaðu allir dreingir
til jomfrúdans
tá var friðurin heima.

14.

So varð einki meira
tann vívilkrans
uttan kettan fekk ein geira
til jomfrúdans
tá var friðurin heima.

15.

Og hanin fekk ein høvuðdúk
tann vívilkrans
og hønan fekk ein skóklút
til jomfrúdans
tá var friðurin heima.